
LM-114/2020

Saman um eina trygga KT-loysn

Heildarætlan fyri undirvísingarverkið 2021-2024



4. september 2020

Undirvísingarstýrið

Innihaldsyvirlit

1. SAMANDRÁTTUR 3

2. BAKGRUND 4

3. STØÐULÝSING 5

3.1 AVBJÓÐINGIN 5

3.2 KÓSIN ER FELAGS LOYSNIR OG SAMSTARV 5

4. HEILDARÆTLANIN 6

4.1 ENDAMÁL 6

4.2 STRATEGI: SAMAN UM EINA TRYGGA KT LOYSN 6

4.3 STRATEGISK ÁTØK 6

5. EITT FELAGS TRYGT SKÚLANET 7

5.1 SKÚLANET ER EITT SAMSTARV VIÐ KT LANDSINS 7

5.2 SKÚLANETIÐ LOYSIR TÆR TRUPLU KT-UPPGÁVURNAR FYRI STOVNARNAR 8

6. EIN FELAGS LESTRARFYRISTINGARLIG KT SKIPAN (LFS) 9

6.1 GREINING AV MØGULEIKUM 9

6.2 HVAT FEVNIR LFS UM? 10

6.3 FYRSTA STIG ER EIN TRYGG KJARNA 10

6.4 SJÁLVVIRKANDI DÁTUDEILING, SUM ER TRYGG 10

6.5 HAGTØL 11

6.6 MENNINGARTILGONGD 12

6.7 TALGILDU FØROYAR - EIN TÝÐANDI FYRITREYT 12

6.8 TÍÐARÆTLAN 12

7. ORGANISATORISKAR OG FÍGGJARLIGAR FYRITREYTIR 13

7.1 EIN VERKÆTLANARSKIPAÐ MENNINGAREIND Í UVS 13

7.2 ORGANISATIÓNSTILLAGING OG AVTALUR 13

7.3 FÍGGJARÆTLAN 14

7.4 AÐRAR FYRITREYTIR 14

1. Samandráttur

Heildarætlanin fyri KT umsiting í undirvísingarverkinum 2021-2024 fevnir um tvey høvuðsátøk, sum eru

1. **At stovna "Skúlanet", sum er ein felags rakstrar- og supportorganisatión,** ið mennir og rekur eitt vælvirkandi og trygt KT net fyri alt undirvísingarverkið, svarandi til tað, sum Landsnet er fyri landsstovnarnar.

   Skúlanet er ein KT felagskapur millum Undirvísingarstýrið, Nám, kommunurnar, fólkaskúlan, miðnám og Setrið og KT-landsins. Størsti parturin av uppgávunum verða útveittar til føroysku KT vinnuna.

2. **At menna eina framkomna og trygga lestrarfyrisitingarskipan (LFS),** sum er felags fyri fólkaskúlar, miðnám og Setrið. LFS setur dik á talgilda skúlaumsiting, lærupallar og samskifti millum skúla, næming og heim. Úr LFS fáast álítandi hagtøl til skúlar, myndugleikar og politisku skipanina.

   Ein týðandi partur er at gagnnýta undirstøðukervið í Talgildu Føroyum til eitt nú sjálvvirkandi datadeiling millum skúlar og myndugleikar og sjálvgreiðsluloysnir, so sum at søkja um lestrarstuðul og heinta prógvskjøl.

Forkanningar hava staðfest, at eingin av verandi KT-skipanum lýkur krøvini til KT-trygd og verju av viðkvomum persónsupplýsingum. Fleiri KT-skipanir krevja longu nú dagføringar, sum hvør sær eru kostnaðarmiklar. Landsgrannskoðarin og Dataeftirlitið hava víst á álvarsligar trygdarveikleikar í verandi skipanum. Skúlaleiðslur, myndugleikar og politiska skipanin fáa ikki álítandi hagtøl, ið eru ein fyritreyt fyri umsiting, planlegging og menning.

Staðfest er ein víðfevnd dupultskráseting og manuell deiling av upplýsingum, sum elva til feilir í málsviðgerð og høpisleyst orkuspill hjá myndugleikum, lærarum, næmingum og foreldrum.

Eitt stórt óbrúkt potentiali liggur í at skipa KT-virksemið í felag, har vit tvørtur um stovnsmørk gagnnýta teir góðu KT-førleikarnar og dyggu royndirnar, sum longu eru í undirvísingargeiranum til menning, rakstur og support.

Í Føroyum eru vit í heimsflokki at brúka KT í almenna geiranum. Almennir stovnar hava saman við føroysku KT vinnuni ment tryggar og vælvirkandi KT-skipanir fyri borgaran.

Dømi eru Skattaskipanin, Búskaparskipan Landsins, Talgilda heilsuskipanini, Útgjaldskipanin í almannaverkinum og Talgildi Samleikan, sum nú verður settur í verk.

Tíðin er nú búgvin til at seta sjóneykuna á undirvísingarverkið, sum tørvar eina grundleggjandi endurnýggjan og umskipan av KT virkseminum, sum er lýst í hesi heildarætlan.

Tað er Uttanríkis- og mentamálaráðið saman við Undirvísingarstýrinum og Nám, ið hevur staðið fyri fyrireikandi arbeiðinum.

Týdningarmestu fyritreytirnar, nú at fara undir Heildarætlanina 2021-2024, eru:

1. **at seta á stovn eina verkætlanarskipaða strategiska KT eind í UVS,** sum stendur á odda fyri at samskipa, menna og seta í verk átøkini í hesi heildarætlan.
2. **at útvega ein <u>løgujáttan</u> upp á 41,5 mió. kr.**, sum er góðar 10 mió kr. árliga komandi 4 árini.

Arbeiðið verður gjørt í tøttum samstarvi við KT landsins og Talgildu Føroyar, har undirvísingarverkið kann gagnnýta førleikar og tær vælvirkandi og framkomnu loysnir, sum eru mentar. Hettar sparir tíð, orku, pening og minkar um teir vælkendu váðar, sum eru í so fjøldtáttaðum verkætlanum.

Málið er at Skúlanetið og nýggja lestrarfyrisitingarliga KT-skipanin er sett í verk í øllum undirvísingar-verkinum í 2024 og at rakstur, viðlíkahald og víðarimenning frá 2025, verða fíggjað innan verandi játtan.

2. Bakgrund

Seinastu 15 árini er ein rød av KT-skipanum ment til lestrarfyrisiting. Dømi um slíkar KT-skipanir eru Vitanet og Kervi í fólkaskúlanum, sum UMMR og Nám hava staðið fyri at ment. Aðrar skipanir eru, sum útbúgvingarstovnarnir hava ment hvør sær, t.d. Smedemarksskipanin í Suðuroy, Klaksvík, Vestmanna og á Kambsdali, Tímaglasið á Glasi og Prógbókin á Setrinum.


Í 2019 staðfesti UVS, ið er myndugleikin á økinum, saman við leiðslunum, ein átrokandi tørv á nýggjum og betri KT-skipanum, og at støðan á fleiri økjum er alsamt meira hættislig.

Hvørki fólkaskúlar, miðnámsskúlar, Vinnuháskúlin ella Setrið hava KT-skipanir, sum í nærmastu framtíð fara at nøkta tørvin. Ongar meginreglur eru fyri, hvørjar umsitingarligar funktiónir skulu talgildast, hvørjar skipanir eru best egnaðar, ella hvørji krøv skulu setast til dátur og hagtøl.

Mest álvarsamt er tó, at skipanirnar ikki liva upp til verandi lógarkrøv – *og als ikki til komandi* – krøv um dátutrygd, ella verju av viðkvomum persónsupplýsingum sbrt. General Data Protection Regulation (GDPR), sum verður galdandi 1. januar 2021.

Breið semja er um, at bráðfeingis tørvur er á eini heildarætlan fyri KT-umsiting í undirvísingarverkinum.

UMMR hevur saman við UVS og Námi staðið á odda fyri eini tilgongd um strategi, har eitt verkætlanartoymi frá september 2019 til august 2020, hevur gjørt forkanningar í Føroyum, og sett seg inn í støðuna í Norðurlondum. Úrslitið er henda heildarætlan, ið er gjørd saman við øllum týðandi áhugapørtum og har breið undirtøka er fyri tilmælunum.



Mynd 1. Strategitilgongdin er kjølfest í UMMR. Verkætlanartoymið er mannað við fakfólkum úr UMMR, UVS, NÁM og royndum uttanhýsis ráðgevum í strategi og KT-verkætlanum innan tað almenna. Tilgongdin hevur fevnt um breiða innvolvering av áhugapørtum og serfrøðingum í arbeiðsbólkum, verkstovum og strategiseminarum.

3. Støðulýsing

Seinastu 10-15 árini eru nógv stig tikin til at útvega og menna lestrarfyrisitingarligar KT-skipanir til umsiting, undirvísing og samskifti millum skúla, næming/lesandi og heimið. Menningin av skipanum er hend parallelt innan teir ymisku undirvísingargeirarnar og á hvørjum einstøkum stovni. Tey starvsfólk, sum hava staðið fyri hesari menning, hava fingið holla vitan og dyggar royndir á økinum. Virksemið á skúlunum og útbúgvingarstovnunum er í dag treytað av, at hesar skipanir rigga og ikki svíkja.

3.1 Avbjóðingin

Forkanningar hava staðfest, at eingin av verandi KT-skipanum lýkur krøvini til KT-trygd og verju av viðkvomum persónsupplýsingum. Fleiri KT-skipanir krevja longu nú dagføringar, sum hvør sær eru kostnaðarmiklar. Skúlaleiðslur, myndugleikar og politiska skipanin fáa ikki álítandi hagtøl, ið eru ein fyritreyt fyri planlegging, umsiting og menning.

Somu dátur verða skrásettar umaftur og umaftur; upplýsingar verða manuelt skiftar millum skúla og myndugleikar. Dupultskrásetingin hevur við sær feilir í málsviðgerðini, ger eftirlit hjá myndugleikum tungt og elvir til óneyðugar útreiðslur og skeiv útgjøld, t.d. í lestrarstuðli.


Í okkara grannalondum vera álítandi hagtøl mett sum alneyðugt grundarlag undir skúlaleiðslu og -umsiting, eins og tey verða mett sum ein treyt fyri at menna skúlar, umsiting og politikk.

Eitt stórt óbrúkt potentiali liggur í at skipa KT-virksemið í felag: at keypa telduútgerð og KT-skipanir í felag, at skipa fyri felags rakstri og support og í felag at gagnnýta tvørtur um stovnsmørk teir góðu KT-førleikarnar, sum longu eru í undirvísingargeiranum.

Í Føroyum eru vit í heimsflokki at brúka KT í almenna geiranum. Almennir stovnar hava saman við føroysku KT vinnuni ment tryggar og vælvirkandi KT skipanir fyri borgaran. Dømi eru Skattaskipanin, Búskaparskipan Landsins, Talgilda heilsuskipanin, Útgjaldskipanin í almannaverkinum og Talgildi Samleikin, sum nú verður settur í verk. Tíðin er nú búgvin til at seta sjóneykuna á undirvísingarverkið, sum tørvar eina grundleggjandi endurnýggjan og umskipan av KT virkseminum.

3.2 Kósin er felags loysnir og samstarv

Fyri at fáa eina tíðarhóskandi og trygga útbúgvingarskipan, skal ein grundleggjandi broyting til, hvussu KT verður nýtt og skipað í undirvísingargeiranum. Felags loysnir og felagsskapir eru lyklaorð í loysnini.





Mynd 2.

Støðumynd 2020: Hvør í sínum lagi – trygdin er hótt.
Lokalar skipanir og net, við misjavnaðari góðsku, sum ikki lúka trygdarkrøv

Støðumynd 2024: Felags trygt net og KT-loysnir
Allir stovnar hava trygt krypterað net til felags rakstrardepil og út á Alnótina.

4. Heildarætlanin


4.1 Endamál

Fyri at loysa tær lýstu avbjóðingarnar og fyri at dekka tann tørv sum undirvísingargeirin hevur, mugu vit røkka hesum endamálum:

- Økja um KT- og dátutrygdina í undirvísingargeiranum
- Økja um dygdina í upplýsingum um næmingar og fak (dátarikin skúlamenning)
- Veita skjótt og álítandi avgerðargrundarlag fyri politikk- og sektormenning
- Betra um samskiftismøguleikar millum skúla, fakfólk, næmingar og foreldur
- Sleppa undan dupultarbeiði í fyrisitingini á skúlum, hjá myndugleikum og hjá næmingum
- Skapa fyritreytir fyri munadyggum eftirlits- og myndugleikaarbeiði

4.2 Strategi: Saman um eina trygga KT loysn

Fyri at røkka endamálunum krevst, at KT-virksemið verður skipað grundleggjandi øðrvísi.



Mynd 3. Í desember 2019 var strategiska kósin sett. Í januar – juni 2020 er nágreiniligt eftirkannað og staðfest at strategiin er haldfør og greiningar gjørdar av, hvat krevst fyri at fremja hesa.

4.3 Strategisk átøk

Kjarnin í hesari broytingartilgongdini er at fremja tey átøk, sum verða lýst nærri á næstu síðunum:

1. at uppbyggja KT-felagsskapin Skúlanet
2. at menna eina lestrarfyrisitingarliga KT-skipan (LFS), sum er felags fyri allan undirvísingargeiran.

Herumframt verða lýstar organisatoriskar og fíggjarligar fyritreytir fyri at fremja ætlanina.


5. Eitt felags trygt Skúlanet

Stovnaður verður ein KT-felagsskapur fyri fólkaskúla, miðnám og hægri lærustovnar, "Skúlanet", svarandi til tað, Landsnet er fyri teir almennu stovnarnar.

Skúlanet er eitt vælvirkandi og trygt KT-kervi, sum fevnir um eitt fullfíggjað og trygt undirstøðukervi við støðugari atgongd til internetið, við telduarbeiðsplássum og við KT-útgerð, so sum printarum og samvirknum talvum. Undirstøðukervið verður ment og hildið við líka av einari KT-rakstrarorganisatión, ið er skipað sum eitt samstarv millum tann einstaka skúlan, kommunurnar, Undirvísingarstýrið/Nám og KT Landsins.

5.1 Skúlanet er eitt samstarv við KT Landsins

KT Landsins hevur síðan 2006 bygt upp hollar førleikar innan KT-tænastur, KT-rakstur og -support, KT-trygd og umsiting av sáttmálum við KT-veitarar. Í dag veitir KT Landsins 2.500 KT-brúkarum tænastu á 50 almennum stovnum.



Mynd 4. Skúlanetið veitir felags keypsavtalur, dagliga brúkaraumsiting, teldur til starvsfólk, tryggjar hýsing av dátum, trygt undirstøðukervi, KT-helpdesk við døgnvakt og KT-serfrøðingum, sum koma á staðið, journal, samskipan av fakligum felagsskapum og førleikamenning av superbrúkarum og lokalum KT-umsitarum.

5.2 Skúlanetið loysir tær truplu KT-uppgávurnar fyri stovnarnar

Skúlanet veitir KT-trygd, KT-innkeyp, KT-rakstur og KT-support til allar stovnar í undirvísingarverkinum. KT-support fæst alt samdøgrið, so brúkararnir kunnu fáa loyst átrokandi trupulleikar, eisini uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

KT-serfrøðingum koma á staðið fyri at fremja ætlaðar tøkniligar uppsetingar av hardware og fremur neyðuga upplæring á staðnum. Tað merkir, at nógvar tekniskar uppgávur verða fluttar frá stovnunum til Skúlanetið. Sostatt ber til hjá KT-starvsfólkum at savna seg um KT-didaktiska ráðgeving, og hjá skúlunum at savna seg um skúlaskap og ikki KT-spurningar.

Skúlanet hevur orku, førleikar og ábyrgd fyri at allur geirin lýkur krøv til KT-trygd. Skúlanet hevur eisini ábyrgd av at halda strangt eftirlit við møguligum KT-hóttanum og alt fyri eitt at taka neyðug stig at basa slíkum hóttanum.

Við Skúlanetinum fáa næmingar og starvsfólk eitt einsháttað KT-tilboð, uttan mun til, hvørjum skúla ella hvørja kommunu tey hoyra til. Fleiri uppgávur innan rakstur og tænastu kunna savnast og lagast eftir somu fyrimynd. Lyklaorð eru synergi, stórdrift og standardisering. Á hendan hátt verður KT-tænastan betri, tryggari og bíligari.

Skúlanet orðar felags standardir fyri dagføring av KT-undirstøðukervum, so størri íløgur á einstøku stovnunum og í felagskervinum kunnu samskipast og raðfestast.

Skúlanet er skipað sum eitt samstarv millum UVS, Nám, KT Landsins, kommunurnar og hvønn einstakan skúla og útbúgvingarstovn. Rakstraruppgávurnar verða, har tilber, veittar út til føroyskar KT-veitarar.

UVS ger formliga avtalu við KT Landsins um samstarv og veitingar. UVS hevur myndugleika av strategisku avgerðunum í Skúlanetinum. Hetta hendir í samráð við eitt brúkararáð, mannað við umboðum fyri UVS/Nám, KT Landsins, kommunurnar, fólkaskúlan, miðnám og Setrið.

Skúlanet verður sett á stovn 1. januar 2021. Innliming kann byrja á vári 2021 og verður skipað í samráð við stovnar og kommunur. Miðað verður eftir, at allir skúlar og útbúgvingarstovnar eru innlimaðir, seinast í 2024.

6. Ein felags lestrarfyristingarlig KT skipan (LFS)


Ein føroysk lestrarfyrisitingarlig skipan (LFS), sum er felags fyri fólkaskúla, vinnu- og miðnámsskúlar og Setrið, verður ment. Skipanin verður ment saman við føroyskum KT-fyritøkum grundað á føroyskar royndir og norðurlendskar "state-of-the-art" fyrimyndir.

Gjøllar greiningar staðfesta, at verandi støðan við nógvum ymiskum lokalum KT-loysnum ikki er burðardygg og heldur ikki lýkur ynski og krøv í framtíðini. Ein bólkur av serfrøðingum mælir til at fara undir at menna eina felags LFS, sum byggir á dyggar føroyskar royndir og førleikar við íblástri frá mest framkomnu norðurlendskum skipanum.

6.1 Greining av møguleikum

Grundarlagið fyri tilmælinum er nágreinilig screening av norðurlendska marknaðinum, har 4 skipanir vórðu valdar til samanbering í mun til strategisk krøv, ið vóru sett til eina komandi felags skipan.

Tvær føroyskar skipanir (Tímaglasið og Kervið), ein íslendsk (Namfus) og ein donsk skipan (Uddata+) vóru við í samanberingini. Úrslitið av kanningunum er her myndað sum ein profilur fyri hvørja skipan sær, sum gevur ábendingar um, í hvønn mun tær lúka tey settu krøvini.




Mynd 5. Her sæst grafiskt í hvønn mun tær kannaðu skipanirnar lúka tey settu krøvini.

Tær føroysku skipanirnar er kannaðar nærri, við serligum atliti at verandi og komandi trygdarkrøvum, og um tær vóru egnaðar til víðarimenning til eina felags skipan fyri alt undirvísingarverkið. Út frá eini samlaðari meting av fyrimunum og vansum við at keypa eina útlendska standarskipan (Uddata+) og sjálvi at menna ein føroyska skipan ímt. kostnað, váðar, fleksibilitet uppá stutt og langt sikt verður mælt til at menna ein føroyska skipan.

6.2 Hvat fevnir LFS um?

LFS er sett saman av fleiri modulum og er partur av einum størri netverki av almennum KT-skipanum, har dátur sjálvvirkandi kunnu býtast sínámillum og endurnýtast.



Mynd 6. LFS kjarnan fevnir um teir grundleggjandi umsitingarligu hentleikarnar. 3.-parts-skipanir eru serstakar standardskipanir, sum tað ikki loysir seg at menna sjálv, og sum verða knýttar at kjarnuni. LFS verður ment á framkomnum tøkniligum palli, har allir áhugaðir KT-veitarar kunnu bjóða seg fram við víðarimenning og viðlíkahaldi.

6.3 Fyrsta stig er ein trygg kjarna


Fyrsta stig er at menna kjarnufunktionalitetin, sum síðan stigvíst kann víðkast. Hesin funktionalitetur fevnir um eina dátabasu við øllum stammdátum, tryggum brúkara-login, møguleika at melda seg til valfak, at upprætta flokkar, at gera tímaroknskap, leggja ársætlanir, vísa kalendaran, hava yvirlit yvir hølini, skráseta fráveru, leggja útbúgvingarætlanir, geva boð, skráseta prógvtøkur og gera prógv.

Herumframt ber til at knýta kjarnuna til aðrar skipanir (3.-parts-skipanir frá øðrum veitarum) og býta dátur sína millum við aðrar almennar KT-skipanir umvegis Heldina.

Eitt krav til nýggju LFS er, at hon skal lúka krøvini til dátutrygdina og til krøvini um, at viðkvæmar persónsupplýsingar verða vardar.

6.4 Sjálvvirkandi dátudeiling, sum er trygg

Ein samlað LFS hevur aðrar fyrimunir við sær: tað fer at krevja minni orku og færri útreiðslur at binda tær ymisku KT-skipanir saman, og upplýsingar um næmingar, fak og stovnar fara at hava hægri góðsku. Á hendan hátt slepst undan dupultskráseting og høpisleysum dupultarbeiði.




Mynd 7. Her sæst hvussu fjøltáttaður tørvurin er á lestrardátum hjá skúlum, útbúgvingarstovnum og myndugleikum

Tá allar upplýsingarnar eru savnaðar á einum stað, eru heilt nýggir møguleikar at menna bæði lærugreinar, útbúgving og tann einstaka stovnin út frá haldbarum og eftirfarandi dátum. Góðskan í kunningini millum næmingar, foreldur og lærarar kann betrast; stovnar og myndugleikar fáa grundarlag fyri at kunna veita politisku skipanini betri tænastur.

6.5 Hagtøl

Ein týðandi partur av LFS er møguleikin fyri løttum og ómakaleysari atgongd til hagtøl, til ymisk endamál og til ymsar málbólkar. Her er eitt dømi um eina talvu, sum ein skúlaleiðari sjálvur kann seta upp, við teimum upplýsingum, hann hevur tørv á at síggja. Tað er lætt at seta upp og velja teir parametrar og uppdeilingar, ið skulu vísast.



Mynd 8. Dømi um sonevnt "Dashboard" til leiðslukunning. Alt eftir hvør tú ert og hvørja uppgávur tú loysir, ber til at seta upp og vísa tey yvirlit, ið gera tína uppgávu lættari sum skúlaleiðari, lærari, málsviðgeri í einum stovni, stýri ella í ein ráði.

6.6 Menningartilgongd

Menningin av LFS er ein stigvís, fjøltáttað og umfatandi uppgáva. Hon krevur hollan kunnleika til útbúgvingarskipanina, fyrisitingarligar mannagongdir og KT-menning. Royndir brúkarar av verandi lestrarfyrisitingarligu skipanum eru longu nú limir í einum arbeiðs- og raðfestingarbólki, ið setur krøv til og tryggjar góðskuna av komandi LFS.

Uppgávan at menna LFS verður útveitt til eitt toymi, mannað við KT mennarum frá einari, ella fleiri føroyskum KT fyritøkum. Stórur fyrimunur er at savnað menningartoymið í UVS saman við verkætlanartoyminum í UVS, sum tryggjar tætt dagligt samstarv og javna endurskoðan og tillaging av tí, sum ment verður.

Tað liggur í kortunum at nýta ein "agilan menningarhátt", har yvirskipaðu krøvini eru orðað frammanundan, meðan ítøkiligu krøvini verða orðað so hvørt, sum skipanin verður ment, í tøttum samstarvi við ein brúkarabólk, sum er settur breitt saman.

UVS orðar í hesum døgum, saman við Gjaldstovuni, ið er myndugleiki fyri keyp av almennum tænastum, meginreglur fyri, hvør útboðstilgongd og hvat slag av sáttmála, eru best hóskandi til hesa verkætlan. Formaður í KT felagnum og stjórarnar í stórstu KT fyritøkurnar hava verið á kunandi fundum, har vit hava viðgjørt avbjóðingar og fingu góð og tey fegnast um tilmæli um at menna eina føroyska skipan, heldur enn at keypa útlendska.

6.7 Talgildu Føroyar - ein týðandi fyritreyt

LFS verður tøkniliga og fíggjarliga gjørligt m.a. við at gagnnýta allar tættir í tí undirstøðukervinum, sum júst eru mentir í verkætlanini Talgildu Føroyar:

- **"Heldin"** knýtir ómakaleyst, trygt og bíliga KT-skipanir og myndugleikar saman.
- LFS fær talgilda atgongd til "**Grunddátur"**, serstakliga til Landsfólkayvirlitið og adressuskránna. Hetta loysir trupulleikan við at skráseta stammdáta um persónar fleiri ferðir uttan orsøk.
- **"Vangin"** og **"Mín Boks"** gevur ómakaleysa og trygga atgongd til **"Mín útbúgving"**, sum er próvskjøl, upplýsingar og samskifti millum avvarðandi skúlar og myndugleikar.
- **"Talgildi Samleikin"** ger hesa atgongd trygga.

UMMR og FMR gera formliga avtalu um, hvussu hentleikarnir og førleikarnir hjá Talgildu Føroyum kunnu verða partar í komandi menning av LFS

6.8 Tíðarætlan

Metingin er, at við lýsta menningarleistinum fer tað at taka hálvtannað til tvey ár at menna kjarnufunktionalitetin og at samskipa týdningarmestu 3.-partsskipanirnar, sum so kunnu setast í verk. Eftir hetta skal ískoytisfunktionalitetur mennast.

Hóast tær eru ófullfíggjaðar og ikki tryggar, so eru verandi KT-skipanir tað talgilda nervalagið hjá skúlunum og útbúgvingarstovnunum. Tí er neyðugt at seta orku og pening av til rakstur og support av verandi lestrarfyrisitingarligu skipanum, so hesar koyra best møguligt, meðan tann nýggja LFS verður ment.

LFS verður við røttu fyritreytunum klár at seta í verk við skúlaársbyrjan 2022. Málið er at verandi lestrarfyrisitingarligu skipanirnar eru útfasaðar seinast í 2024.


Farið verður undir fyrireikingina 1. oktober 2020, og menningin av nýggju LFS byrjar 1. januar 2021

7. Organisatoriskar og fíggjarligar fyritreytir

7.1 Ein verkætlanarskipað menningareind í UVS

Ein strategisk KT-eind verður skipað í Undirvísingarstýrinum, sum fær ábyrgd av at samskipa menning, verkseting, rakstur og support. Eindin verður mannað við einum deildarleiðara (verkætlanarstjóra) og trimum fakábyrgdarum (verkætlanarleiðarum) fyri ávikavist LFS, Skúlanet og útbúgvingardáta. Deildin verður mannað skjótast til ber og í seinasta lagi 1. januar 2021, um tíðarætlanin skal halda.

Talgilda umskipanin av undirvísingargeiranum verður fjøltáttað og krevjandi. Ein fyritreyt fyri, at hon kann eydnast, er, at hon eisini framhaldandi er grundfest hjá evsta avvarðandi mundugleika, sum er UMMR.



Mynd 8. Leiklutir, ábyrgd og átøk verða samskipað og raðfest í samstarvi við áhugapartarnar í undirvísingarverkinum, sum verða umboðað í stýrisbólki, ráðgevandi leiðsluforum, tílvísingarbólkum ella sum limir í arbeiðsbólkum innan tey ymisku økini.

7.2 Organisatiónstillaging og avtalur

Fortreyt fyri heildarætlanini er, at ein ein røð av KT-funktiónum og -førleikum í undirvísingarverkinum verða umskipaðar. Ein ætlan fyri hesar verður gjørd saman við avvarðandi leiðslum.

Hetta verður gjørt sambært galdandi avtalum og mannagongdum fyri bygnaðarbroytingar innan tað almenna, og verður gjørt í tøttum samstarvi við stovnsleiðarar, viðkomandi starvsfólk, yrkisfeløg og kommunur.

Ein týðandi fyritreyt er, at leiðslur og starvsfólk fáa neyðuga førleikamenning og hjálp og stuðul at fremja tær broytingar, sum heildarætlanin hevur við sær í mun til broytingar í organisatiónsstrukturi, leiklutum, starvsinnihaldi, organisatiónsmentan og broytingum í mannagongdum.

8. Fíggjarætlan

Samlaði kostnaðurin til leiðslu, samskipan, menning, verkseting og rakstur í tíðarskeiðnum 2021-2024 er mettur at vera 89 mió. kr í 4 ár. Talan er í stóran mun um útreiðslur, sum longu standast av verandi virksemi í UVS, hjá Nám, kommununum og KT útreiðslur á skúlum og útbúgvingarstovnum. 47, 5 mió kr kunnu sostatt fíggjast innan verandi játtan.

Tørvurin fyri eykafígging er 41,5 mió. kr, sum er tann *íløga,* ið krevst til at fremja heildarætlanina, og sum má fíggjast umvegis fíggjarløgtingslóg við í meðal uml. 10 mió. kr um árið 2021-2024.

Kommunurnar koma samanlagt at gjalda tað sama ella nakað meir enn tær gera ídag í teirra part til net, teldur, rakstur og support (Skúlanet)

Mett verður, at framhaldandi KT-rakstur og menning eftir 2025 fara at kunna fíggjast innan verandi menningar- og rakstrarfíggjarætlan við at umskipa og raðfesta innanhýsis í undirvísingarverkinum.

8.1 Aðrar fyritreytir

Ein so stór almenn KT-verkætlan hevur sjálvsagdar óvissur og vælkendar váðar. Mest týðandi fyritreytirnar fyri, at tíðar- og kostnaðarmetingarnar halda, eru:

- at støðuføst politisk undirtøka fæst tvørtur um valskeið
- at leiðslur taka undir við lýstu broytingum og standa á odda fyri at fremja hesar
- at lyklastarvsfólk við røttum førleikum manna verkætlanarorganisatiónina, og at hesi støðast, so tann vitan, ið verður bygd upp so hvørt, verður varðveitt
- at formligar avtalur verða gjørdar við Talgildu Føroyar og KT Landsins.
- Eisini skal gerast formlig avtala við Styrelsen for IT og læring, sum hevur 20 ára royndir við menning av lestrarfyrisitingarligum skipanum í Danmark og sum eisini framyvir er sinnað at veita ráðgeving.

Bólkauppgáva

Grundarlagið er Heildarætlanin og fakligu framløgurnar

Til orðstýraran: Við støði í okkara "interessentperspektivi", skifta vit orð um strategi og høvuðsevnini í fakligu framløgunum. Tykkara leiklutur er at stuðla mær at taka saman um svarið og raðfesta spurningin. Frymilin niðanfyri er hugsaður sum eitt hjálpiamboð.

Arbeiðsfrymil:

NYTTA / ÁGÓÐAR HJÁ "OKKUM" Við støði í *okkara* "interessentperspektivi": Hvørjir eru so teir størstu ágóðarnir í heildarætlanini, herundir eitt felags Skúlanet og ein felags LFS lestrarfyrising, læring og samskift?	**FYRITREYTIR** 1. Hvørjar týðandi fyritreytir mugu útvegast, um ágóðar skulu vinnast? 2. Hvørjir spurningar skulu svarast, um heildarætlanin skal eyðnast, sæð úr okkara sjónarhornið?
TILMÆLI: Átøk, hugskot, ráð … Hvørji trý tilmæli hava vit til stýrisbólkin/ projekttoymið, sæð í mun til planlegging og verkseting av heildarætlanini komandi árini? **Tilmæli 1)** **Tilmæli 2)** **Tilmæli 3)**	**EIN KJARNUSPURNINGUR** Hvørjar spurningar hava vit, sum vit kundu ynskt svaraðar ídag? **Okkara kjarnuspurningur er:**

Framløga: Allir orðstýrarar eru á pallinum samstundis við smáu borðini.
Tit hava 4 - 5 minuttir at taka samanum og at seta ein spurning, sum tit ynskja svaraðan.
Um tíð er tess kunnu tit í bólkinum leggja afturat.
T.v.s tit raðfesta sjálvi tíðina – tit hava 8 min. tilsamans.
GG: framløgurnar verða upptiknar á video, sum vit loyva okkum at nýta í komandi kunningarátøkum, um tit ikki noktað hesum. (Kontakt: Birgir Kruse tlf: 555165, Tpostur: birgir @nam.fo)

Heildarætlan fyri Undirvísingarverkið 2021-2024

Strategiseminar

Fríggjadag 4. september 2020 Kl. 9.00-12.15

Klingran, Norðurlandahúsið

Luttakarar:

Stýrisbólkur, ráðgevandi leiðslufora, projekttoymi, arbeiðsbólkar og umboð fyri myndugleikar og áhugapartar

Tíðspunkt	Skrá fyrrapart kl. 09.00-12.15
09.00	**Kaffi og breyð**
09.30	**Framløga (Plenum)**
15 min	**Inngangur, endamál og skrá** Dánjal Pauli Haraldsen og Birgir Kruse
10 min	**Heildarætlanin í stuttum (Filmsbrot)** Hjalmar Hansen, stjóri, UVS og Eyðun Gaard, stjóri, Nám
35 min	**Skúlanet:** Andreas Simonsen **KT skipanin:** Høgni av Skarði **Leiðslukunning og hagtøl:** Mortan Zachariassen
10.30	**Fakligir temabólkar** (Kaffi við borðini úti við vindeyguni)
10 min.	**Intro til bólkaarbeiðið um nyttu, fyrivarni, hugskot og góð ráð**
40 min.	**Bólkaarbeiðið við rundu borðini Klingruni** Kaffi er á borðunum! **Orðstýrðarar pr. tema** 1. **Leiðsla:** Steinbjørn Hardlei, rektari á Glasi 2. **Lestrarfyrisiting:** Martin Karl Olsen, varðaskúlastjóri, Skúlin á Fløtum 3. **Undirvísing og samskifti:** Umboð fyri lærarar 4. **KT menning:** Høgni av Skarði, KT ráðgevi, Glasir 5. **Rakstur og support:** Andreas Simonsen, Nám
11.20	**Framløga av bólkaarbeiði (Plenum)**
45 min	**Framløga bólkaarbeiðið og spurningar** Umboð fyri bólkarnar leggja fram, og spurningar verða svaraðir
10 min	**Samanumtøka**
12.15	**Frokost í forhøllini /Klingruni**

Heildarætlan fyri Undirvísingarverkið 2021-2024

Handan av Heildarætlan til Landstýrismannin

Fríggjadag 4. september 2020 Kl. 13.00-15.00

Klingran, Norðurlandahúsið

Luttakarar umframt tey frá fyrrapartinum:

UMMR; Kommunufelagið, KT fyritøkur, myndugleikar og fjølmiðlar

Tíðspunkt	Skrá seinnapart, kl. 13.00-15.00
13.00	**Framløga av Heildarætlanini**
5 min.	**Bakgrund og tilgongd** Poul Geert Hansen, aðalstjóri, UMMR
5 min.	**Heildarætlan** Hjalmar Hansen, stjóri, UVS
5 min.	**Skúlanetið** KT rakstur og support : Andreas Simonsen, verkætlanarleiðari
5 min.	**Ein felags KT skipan til Setur, miðnám og fólkaskúla:** Høgni av Skarði; námsfrøðisligur ráðgevi og KT mennari
13.20	**Heildarætlanina úr fýra sjónarhornum**
30 min. (4 x 7½ min)	1. **Setrið:** Ólavur Ellefsen, stýrisformaður 2. **Miðnám:** Steinbjørn Hardlei, rektari, Glasir 3. **Fólkaskúlin:** Martin Karl Olsen, varaskúlastjóri, Skúlin á Fløtum 4. **Undirvísing:** Umboð fyri lærararar og námsfrøði
13.50	**Stegður:** (Kaffi við borðini úti við vindeyguni)
20 min	Høvi at skifta orð
14.10	**Tríggjar týðandi fyritreytir**
20 min.	1. **Eitt trygt, vælvirkandi undirstøðukervi** Leif Abrahamsen, Stjóri, Gjaldstovan 2. **Saman um trygdina** Umboð fyri kommunufelagið 3. **Eitt sterkt KT menningarumhvørvið** Ulla Joensen, formaður í KT felagnum
14.30	**Heildarætlanin verður handað**
3 min.	Hjalmar Hansen handar Landstýrismannin heildarætlanina
7 min.	Landstýrismaðurin hevur orðið
14.40	**Møguleiki at seta spurningar**
	Fjølmiðlar og áhoyrara hava møguleika at seta spurningar
14.50	**Navnakapping og endi**
5 min.	**Kunngerð av navnakappingini**
5 min.	**Uppsamling og næsta stig:** Poul Geert Hansen, aðalstjóri

”Songur til studentaskúlan”

Orð: Karsten Hoydal 1960. Lag: Hans Jacob Højgaard

1. Landið, eg bar við mær inn um skúlagátt,
tað livnaði og vaks í mínum huga
tey fyrstu ár, tá bæði stórt og smátt
var fyri eygað undurverk at skoða,
tá átti grótið lív og tinnuglóð,
Ein stjørnuglæma stóð úr hvørjum broti,
mín sál var gróðrarmikil, kvæm og góð,
so fríð og glað sum grønur keldutroti.

2. Landið! Fjøll og strendur, ber og veðurbrýnd
og líðir, dalar við so ljósum yndi,
og fólkið – fjøld av ættarliðum týnd
á tíðarhavi – skapaðu mítt lyndi,
á hesum lendi gróðursett mín sál
skal menna seg og mátt úr bókum súgva,
í lívsins bjargalendi søkja mál
so djarvt sum orð og mannahugsan flúgva.

3. Havið, eg bar við mær inn um skúlagátt,
tað hav so víða fløtur sínar breiðir,
á sveimi hugur bæði dag og nátt
við teim, sum fóru fjarar skipaleiðir.
Er land mítt lítið, so er verðin stór,
og veking elva havsins løg og sangir,
ein rødd av høvunum at hjarta fór,
gav míni stóru langtan sterkar veingir.

4. Lívið! Dýra undur eg var lutur av,
eitt ævinleikaboð av magn’ og anda,
sum skelvur gjøgnum loft og jørð og hav
við ljósi, myrkri, vøkstri og við vanda,
tað stutta bil, tú streymar gjøgnum meg,
eyðmjúkur hugur mín skal opin vera,
í skapninginum øllum tekkja teg
og tær í verki sátt og sømdir bera.